**Formula-deildin**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | EB/S | 6 | 4 | - | 2 | - | 0 | 15 | 5 | 10 | 14 |
| 2 | HB | 6 | 3 | - | 3 | - | 0 | 13 | 2 | 11 | 12 |
| 3 | B36 | 6 | 2 | - | 4 | - | 0 | 8 | 3 | 5 | 10 |
| 4 | NSÍ | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 8 | 7 | 1 | 10 |
| 5 | ÍF | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 9 | 10 | -1 | 10 |
| 6 | Víkingur | 6 | 2 | - | 1 | - | 3 | 7 | 7 | 0 | 7 |
| 7 | KÍ | 6 | 1 | - | 2 | - | 3 | 7 | 12 | -5 | 5 |
| 8 | B68 | 6 | 1 | - | 2 | - | 3 | 4 | 10 | -6 | 5 |
| 9 | B71 | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 8 | 13 | -5 | 4 |
| 10 | Skála | 6 | 1 | - | 1 | - | 4 | 4 | 14 | -10 | 4 |

**1. deild**

| | | dystir | v | - | j | - | t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VB/S | 6 | 5 | - | 1 | - | 0 | 21 | 7 | 14 | 16 |
| 2 | 07 Vestur | 6 | 5 | - | 0 | - | 1 | 29 | 10 | 19 | 15 |
| 3 | TB | 7 | 4 | - | 0 | - | 3 | 20 | 4 | 16 | 12 |
| 4 | AB | 6 | 4 | - | 0 | - | 2 | 23 | 8 | 15 | 12 |
| 5 | HB | 7 | 3 | - | 2 | - | 2 | 16 | 8 | 8 | 11 |
| 6 | KÍ | 6 | 3 | - | 1 | - | 2 | 10 | 19 | -9 | 10 |
| 7 | Víkingur | 6 | 2 | - | 2 | - | 2 | 7 | 19 | -12 | 8 |
| 8 | B68 | 6 | 1 | - | 0 | - | 5 | 6 | 17 | -11 | 3 |
| 9 | NSÍ | 7 | 1 | - | 0 | - | 6 | 11 | 26 | -15 | 3 |
| 10 | EB/S | 7 | 1 | - | 0 | - | 6 | 5 | 30 | -25 | 3 |

## HB-NSÍ:

# Favorittar fáa fínan møguleika

**Hjá bæði meistarunum í NSÍ og favorittunum í HB er tað eftir soltið tíðarskeið gott høvi at reisa seg í Gundadali sunnudagin**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Ein av lyklauppgerðunum hesa ferð verður í Gundadali, har FM favorittarnir í HB fara at fáa vitjan av meistarunum í NSÍ. Felags fyri bæði liðini er tað, at gongdin seinastu vikurnar ikki hevur verið soleiðis, sum tað undan kappingarbyrjan varð roknað við, at hon skuldi verða.

Men tað er eisini felags fyri bæði liðini, at hóast leikligu avrikini ikki hava staðið mát við tað, sum tað hevur verið roknað við, og sum spælaratilfarið átti at borga fyri, so eru so mikið nógv stig skavað saman, at liðini framvegis eru við í toppstríðnum. Tað boðar frá kvalitetum, sum siga, at tá ið gongd aftur fæst á skjótt og skipað fótbóltsspæl, so verður stutt heilt upp á toppin.

Bæði HB og NSÍ fara í 7. umfar í landskappingini við tapum í lykauppgerðum í viðførinum. Hjá HB var tað dyggur smeitur og vónbrot at tapa fyri B36 í hálvfinaluni í steypakappingini. Hjá HB fer sigurin tískil at kennast eyka søtur, um hann verður vunnin ímóti meistarunum í NSÍ, og hjá teimum í Runavík fer tað at koma ógvuliga væl við at vinna úrtøku í Gundadali ímóti HB.

Tannleyst og vónleyst skýra teir í HB sítt egna avrik, og í vikuni var ein avleiðing, at liðformaðurin, Jákup á Borg, misti bindið, sum sunnudagin fyri fyrstu ferð verður at síggja um armin á Fróða Benjaminsen.

Tá ið HB kom á vøllin til seinnu hálvfinaluna, vóru fýra skiftingar framdar síðani síðsta umfarið í landskappingini. Í hálvfinaluni vórðu tríggjar skiftingar framdar í roynd at fáa størri ferð og meiri tyngd og brodd í. Tølini siga, at tað, sum ikki var eydnast frammanundan, heldur ikki eydnaðist ímóti B36, og nú er setningurin hjá teimum ellivu, sum Rúni Nolsøe fer at senda á vøllin sunnudagin, at skora í opnum spæli. Tað hevur HB ikki megnað í 450 minuttir!

Takið hjá NSÍ er at fáa stig við sær úr Gundadali. Tá ið meistrarnir næstsíðsta mánakvøld taptu 2-0 ímóti EB/Streymi, hevði NSÍ ofta gott pláss at spæla á. Sunnudagin verða fyritreytirnar ivaleyst øðrvísi, tí tá verður tað NSÍ, sum fer at dúva upp á mótálopini, meðan HB fer at hava bóltin stóran part av tíðini.

Hjá NSÍ eru allir spælararnir tøkir uttan miðvallarin Milan Pejcic. Hann varð skaddur undir venjing mikukvøldið. Milan vandi ikki hóskvøldið, og tá var tað rættuliga ivasamt, um hann verður førur fyri at spæla ímóti HB. Fleiri ferðir fyrr í ár hevur Sjúrður Jacobsen loyst Milan av, tá ið 2. hálvleikur hevur verið umleið hálvrunnin.

NSÍ var eina ferð og vitjaði HB í fjør. Tá var úrslitið 2-0 heimasigur. HB var tvær ferðir í Runavík í fjør. Í fyrra førinum vann NSÍ 1-0, og í seinna førinum vann NSÍ 2-1.



*Talan er um tveir av FM-favorittunum, men bæði HB og NSÍ hava havt sínar trupulleikar at stríðast við seinastu vikurnar. Og hetta vilja tey bøta um sunnudagin*

### Fótbóltur um vikuskiftið

**Formula-deildin**

| Dagur | Dystur | Dómari |
|---|---|---|
| 17.05 | Skála-Víkingur | Ransin N. Djurhuus |
| 18.05 | EB/Streymur-ÍF | Jens Petur Brattalíð |
| 18.05 | HB-NSÍ | Lars Müller |
| 18.05 | KÍ-B36 | Eiler Rasmussen |
| 18.05 | B71-B68 | Petur Reinert |

**1. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 17.05 | VB/Sumba-07 Vestur | Páll Augustinussen |
| 17.05 | NSÍ-TB | Høgni Hansen |
| 17.05 | HB-AB | Dagfinn Olsen |
| 17.05 | KÍ-B68 | Jan Skoradal |
| 19.05 | Víkingur-EB/S | Rúni Gaardbo |

**2. deild**

| | | |
|---|---|---|
| 18.05 | Fram-07 Vestur | Pætur Albinus |
| 18.05 | Víkingur-B36 | Símin P. Dam |
| 18.05 | ÍF-AB | Kári M. Poulsen |
| 18.05 | KÍ-TB | Ørvar Jacobsen |
| 18.05 | MB-Skála | Bent T. Linklett |

## EB/Streymur-ÍF:

# Verjuleyst oddalið

**EB/Streymur kann væl standa í eini støðu, har stórur partur av verjuni er burtur, nú teir taka móti ÍF**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Sum oddalið er EB/Streymur sjálvskrivaður favorittur, tá teir sunnudagin taka ímóti ÍF. Men tað kann væl vera, at talan verður um eitt skert oddalið, sum fer á vøllin.

Seinastu vikurnar hevur miðverjan verið mannað við Marna Djurhuus og Sorin Anghel, sum hava riggað framúr. Sorin noyddist tó skaddur av vøllinum, tá EB/Streymur um hvítusunnuna vann á B71, og tað er ivasamt, um hann er til reiðar at spæla um vikuskiftið.

Møguleiki er tó fyri, at Egil á Bø nú aftur er tøkur, eftir at hann hevur verið skaddur, men tað er ikki heilt víst. Ein annar spælari, sum eisini hevur verið nýttur í miðverjuni, er Fróði Clementsen, men hann hevur drigist við skaða í lærkrikanum, og er tí ivasamur.

Hinvegin eru eisini positivir trupulleikar hjá Sigfríði Clementsen at hugsa um, tí ungverski Marcel er nú aftur á klettunum, eftir at hann hevur verið burturstaddur av persónligum ávum.

### Uttan Bartal

Hjá ÍF hevur prátið seinastu vikurnar snarað um leikbannið, sum Bartal Eliasen fekk frá Kappingarnevndini í FSF.

Tað ber við sær, at sterki miðverjin – sum eisini kann gera um seg í álopinum – ikki er við hópinum á Streymnesi. Í Fuglafirði óttaðust tey eisini, at Balasz Sinko fór at fáa tveir daga leikbann fyri sítt reyða kort í nógv umrødda dystinum móti NSÍ, men tað gjørdist talan ikki um, og tí er hann tøkur, eftir at hann og Alexander Jovevic sótu leikbann av sær, tá ÍF vann á B71.

## Skála-Víkingur:

# Víkingar á stevnuvitjan

**Dysturin á Skála er fluttur til leygardag, nú bygdastevna er á skránni**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Enn er talan um rættiliga javna støðu í botninum á stigatalvuni, og tí er einki at ivast í, at Skála fer eftir øllum trimum stigunum, nú teir fáa vitjan av Víkingi.

At talan er um stevnudyst, gerneyvan motivatiónina at vinna minni, tó at steypið ivaleyst vigar minni enn møguleikin fyri teimum trimum stigunum ger tað.

Hjá Skála hevur venjarin, John Petersen, tó sítt at hugsa um, tá liðið skal setast. Umframt langtíðarskaddu Teit R. Joensen og Petur Paula Mikkelsen noyðist John Petersen helst eisini at vera tveir aðrar spælarar fyriuttan. Rumenski verjuspælarin, Vali, og Erland B. Danielsen eru báðir skaddir, og tað verður mett sera ivasamt, um teir báðir eru tøkir longu leygardagin.

Hjá Víkingi er talan langt ífrá um somu trupulleikar. Har hava teir framvegis allar mans tøkar, og kunnu teir fáa trý stig við sær úr dystinum, fer stigatalvan skjótt at líkjast heilt hugaligum lesnaði.